# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Pamuk - ein djørv og røtt avgerð

Tað er eitt sera gott val hjá svensku Nobel-nevndini at kjósa turkiska høvundan Orhan Pamuk Bókmentavirðisløn Nobels. Tað hevur leingi verið mett, at Nobelvirðislønin átti at farið til henda áhugaverda og framúrskarandi rithøvund. Seinasta skaldsøgan hjá Pamuk var bókin "Kar" (á donskum "Sne") frá 2002 (donsk útgáva frá 2006). Her er evnið serliga tvístøðan millum islamismu og vesturlendskan modernitet í Turkalandi í dag. Hon er um útlegd, eksil og um tap av samleika.

Í 2005 kom so "Istanbul — Memories of a City", ið er partvíst endurminningar og essays. Tað er júst hendan bókin, sum hevur tryggjað Pamuk Nobelvirðislønin. Pamuk hevur eina serliga støðu, sum ein av teim fremstu og mest modernaðu vesturlendsku turkisku intellektuellu, ið m.a. hava talað at turkiska drápinum av armenarum. Pamuk er sera væl dámdur í vesturheiminum.

Pamuk er sum ein høvundur tekur til í blaðnum í dag, ein djarvur høvundi og intellektuellur, tí hann hevur verið í vanda fyri at kunna fáa fongsul, fyri at hava tosað um armenarnar. Høvundin, tann vælkendi viðmerkjarin Kim Simonsen, vísir á, at vit hava í Vesturheiminum langan sið fyri at finnast at samfelagnum og religión, hetta er ikki so við islam, her er Pamuk helst eitt dømi um ein sum nærum varð revsaður fyri síni orð.

Tað kemst ikki uttanum, a henda virðislønin hevur ein ávísan politiskan týdning, tá hon verður latin. Fleiri altjóða eygleiðarar hava víst á, at virðislønin til Pamuk helst fer at fáa stóran politiskan týdning fyri Turkaland, hóast Pamuk ikki er vællýddur í heimlandinum. Turkar fara at vera stoltir av landsmanninum, sum sjálvur kann fara at fáa ta lættari við sínar landsmenn eftir hetta. Pamuk hevur roynt at byggja brýr millum eystur og vestur, millum islam og kristna heimin. Nobelvirðislønin er ein viðurkenning av m,a, hesum virksemi og tænir nevndini til miklan heiður – sjálvsagt fyrst og fremst tí talan er um sera gávuríkan høvund. Her er talan um eina djarva og rætta avgerð

**Sosialurin**

## Samkynd og náttúra

**GUNNAR ØREGAARD**
lívfrøðingur

Nógv kjak var í bløðunum fyri okkurt um einum ári síðani viðvíkjandi samkyndum í samband við lógaruppskotið um, at samkynd skuldu verða vard í antidiskriminationsparagraffini. Og av homoFObia verkunum hjá Ole Wich. Í dag er tað eyðsynt, at tey samkyndu heima í Føroyum hava fyri neyðini at vera vard í lógini.

At samkynd verða avbard og hótt við lívinum er ótolandi, og Føroya skomm.

Mótstøðufólk av at innlima samkynd í antidiskriminationsparagraffina hava ført fram, at samkynd hava eina ónátúrliga atferð. Men sjáldan vísa hesi fólk á, hvussu ella hví hví homosexualitetur er ónátúrligur.

Tað er eyðsæð at samkyndi lívsháttur in ikki viðførir børn, og at ílegurnar hjá teimum samkyndu tískil ikki yvirliva í samkyndum parlag. Er hetta orsøkin, at samkynd eru ónátúrlig í teirra sexualiteti? Á henda hátt verður samkyndi lívshátturin reduseraður til bert at snúgva seg um sex, og sex verður reduserað til bert at snúgva seg um nøring. Hetta er heilt burturvið og alt ov einfalt. Elskhugur millum menniskju er fyri tað mesta ikki við tí í hyggju at fáa børn, men heldur at skapa trivna í parlagnum. At vátta kærleika hvør fyri øðrum, og styrkja bondini sum knyta tvey menniskju saman. Henda kensla er helst lík hjá øllum menniskjum, bæði samkyndum og hinkyndum. Maður og kona, sum ikki kunnu fáa børn, halda ofta kortini saman. Og er teirra sexualitetur tá nógv øðrvísi enn hjá teimum samkyndu? At sex ikki bert er fyri at tryggja nøring sæst aftur hjá menniskjum, sum ikki skulu hava fleiri børn. Elskhugurin hvørvur ikki. Hóast títtleikin vanliga minkar, so er vanligt, at eisini gomul fólk eru sexuelt aktiv, um ikki sjúka forðar hesum. Onkur lesari tvíheldur kanska framvegis um, at tað samkynda er ónátúrligt. Gamaní, men so er at hyggja at náttúruni. Tað eru nógvar eygleiðingar av samkyndum djórum. Flugur verða í nógvum lívfrøðisligum starvstovum gjølla kannaðar, tí at teirra arvaeginleikar minna um teir, vit finna í menniskjanum. Lívfrøðingar hava víst, at summar kall-flugur eru samkyndar. Teir hava eisini víst, at um ein ávís ílega verður muterað (t. v. s. broytt so ílegan ikki virkar sum vanligt) so gerst flugan samkynd (2).

Eisini í fuglum er samkynd atferð eygleidd. Í Ny Sælandska Porphyrio porphyrio, ein fuglur, ið minnir nakað um Sevhønu, vilja nakrar bøgur heldur "para" við øðrum bøg-um, sjálvt um steggjar eisini eru at velja ímillum. Tveir pingvin-steggjar í djóragarðinum í Central Park Zoo á Manhattan vóru sera forliptir hvør í øðrum, gjørdu reiður og teir skiftust trúliga at sita á einum steini, teir royndu at klekja. Tá ein djórapassari gav teimum eitt egg, gekk ikki long tíð, áðrenn eggið varð klakt, og steggjarnir tryggjaðu pisuni føði (3) (http://www.msnbc.msn.com/id/4352011/site/newsweek/).

Ein barnabók er skrivað um hesar samkyndu pingvin steggjar (And Tango Makes Three; Parnell, Richardson og Cole). Fleiri onnur súgdjór enn menniskja syna samkynda atferð. Ein kanning vísti, at partur av veðrum (8-10% av teimum kannaðu veðrunum) vóru samkyndir (1). Eg veit ikki, um føroyskir seyðamenn eisini kenna til hetta fyribrigdið? Neytakvígur hava eisini verið eygleiddar og kunnu sýna samkynda atferð. Okkara nærmast ættaðu av djórunum, apurnar eru heldur ikki øðrvísi, hvat hesum viðvíkur. Japanskar makak apur hava verið eygleiddar í mong ár, og millum hesar finnast fleiri samkyndarkvenn-apur. Hesi dømi vóru bert fyri at vísa at tann samkynda atferðin ikki er sermenniskjaslig og ónáturlig.

Okkara hugur at øðrum verður helst grunnlagdur á ungum árum, um hetta ikki er viðføtt. Summar kanningar benda á at hormon ávirkanir í forstrinum hava stóra ávirkan á okkara sexuellu orientering. Sum børn vita tey flestu hvat tey tráða eftir. Og henda tráðan styrkist sum vit gerast eldri, og fyri tey flestu er tráðanin til hitt kynið. Tráðanin kann ikki broytast, um hon illa passar til í samfelagnum vit liva í. Hetta er lætt at skilja um ein hugsar um egnan sexualietet – fá hinkynd vildu broytt til at verið samkynd, um tey onkurvegna fluttu til eitt samfelag, har tað samkynda var tað einasta loyvda. Og hugsanin at tey samkyndu kunnu grøðast, og gerast hinkynd er burturvið.

Nú frættist at Finnur Helmsdal fer at leggja nytt uppskot til lóg, at tryggja at samkynd eru vard í antidiskriminationsparagraffini. Tað er eyðsæð at júst hesin minniluti heima í Føroyum hevur verju fyri neyðini. Gerið ikki sum prestur og Levitur, men sum Sámáriubúgvin. Hjálpi og tryggið teimum hóttu og bukaðu. Tað fer at vera hvørjum einstakum tinglimið til sóma - nú og á dómadegi.

*1. Roselli, C. E., K. Larkin, J. M. Schrunk, and F. Stormshak. 2004. Sexual partner preference, hypothalamic morphology and aromatase in rams. Physiol Behav 83:233-45.*
*2. Ryner, L. C., S. F. Goodwin, D. H. Castrillon, A. Anand, A. Villella, B. S. Baker, J. C. Hall, B. J. Taylor, and S. A. Wasserman. 1996. Control of male sexual behavior and sexual orientation in Drosophila by the fruitless gene. Cell 87:1079- 89.*
*3. Zuk, M. 2006. Family values in black and white. Nature 439:917.*

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.